

*- Abbi málaði nógv, men skitsurnar eru tað besta, tær eru tað sanna og ektaða. Við skitsuni sleppur tú ikki at angra, tí er hon so fantastisk, sigur Aggi. Á vegginum sæst dansiringurin í relief, sum eisini er ein av hennara yndismyndum*

undir Varða, høvdu seyð, og enntá ein hest. Har vóru nógvir grønir blettir. Tað er nú burturi, nógv er broytt, og eg haldi, at Havnin hevur mist tað, sum bygdirnar framvegis eiga, nakað autentiskt og serstakt. Og alt meir eg hugsaði, tess vinarligari gjørdist tankin. Eg fór ikki at missa meg sjálva burtur, fyri tað at eg flutti!

- Tað ljóðar kanska sum ein klisjé, men hesi 4 árini, eg havi búð her suðuri, havi eg ikki kett meg eina løtu. Havi ein góðan verkstað í gamla skúla, eri leiðari á Ruth Smith savninum, sum húsast undir somu lon, havi undirvíst á listabreyt í Vági og í Sumba tveir vetrar, og havi verið so heppin at fingið verkætlanina við Skapandi Spírum latna upp í hendurnar. Eg havi møtt nógvum góðum fólki, og sera stórari vælvild. Eg eri eitt sosialt menniskja og søki út til fólk, dámi væl at merkja eftir og vita hvussu gongur, vera við og gera mína ávirkan. At luttaka í bygdalívinum á ymiskan hátt, gevur góða orku. Og so taki eg mær løturnar í einsemi at lesa og skapa. Havi als ongan trupulleika við at sameina bygdalívið og málningalistina.

## Føroyska listaverðin ørkymlandi

- Tá eg búði niðri, vitjaði eg nógvar framsýningar, ferðaðist til London og París og sá aktuellar framsýningar. Tað geri eg enn, og havi eisini gott samband/samstarv við gomlu listastarvsfelagirnir í Keypmannahavn.

- Heimliga listaverðin er lítil og bólkað, ofta merkt av vina- og kenningapolitikki, og tí haldi eg, tað er trupult at vera við. Mær tykist føroysku listaverðina vera ørkymlandi, ein rúgva verður sýnt fram, og alt eitur list, eisini tað, ið kundi komið undir hugtakið "líkislist". Hetta ger tað tvørligt hjá fólki at skilja, hvat er góð list, og hvat er kopilist.

- Eg haldi ikki, at føroysk list er nóg fjølbroytt, síggi alt ov fá listarfólk skara burturúr við sínum egna úttrykki. Sjálv havi eg ikki nógvar framsýningar, ræðist hópframleiðslu, sum fyri meg ikki hevur so nógv við list at gera, listin skal hava tíð at búnast.

- Eg máli allatíðina í tonkunum, hóast eg havi tíðarbil, har eg ikki vitji verkstaðið, lesi nógv um list og brúki alnótina. Tað mest umráðandi hjá mær er, at tora at standa við tað, eg geri, og vera mín egin. Størsta inspiratiónin er tíðin vit liva í, góðar upplivingar, undarligar upplivingar, strembanin eftir at fylgja við lívinum og forða strongdini, øll ávirkanin, sum kemur bóltandi, vit zappa og sortera allatíðina, dvølja eina løtu, og síðan víðari.

- Eg kann fanga ein setning ella eitt fyribrygdi, sum fær meg at dvølja við eitt tema, t.d. blómumyndirnar. Og hóast ótømandi møguleikar, so leiti eg

## Kvinnur í Suðuroy

Manglandi kjak her suðuri um okkara støðu í samfelagnum, er orsøkin til hesa greinarøð, grundað á samrøður við seks kvinnur í Suðuroynni. Vit eru ikki von við at spíska pennin og siga okkara hugsan alment. Og als ikki kvinnurnar. Men nógvar hava hugsanir og meiningar um, hvussu vit í framtíðini møguliga kunnu koma burturúr hesi støðuni við stagnatión og fráflyting. Kvinnurnar eg hitti eru: Súnhild Holm, Anna B. Samuelsen, Annika Næs Johannesen, Agnes Mols Mortensen, Aggi Ásgeirsdóttir og Kirsten Strøm Bech. Hetta er fjórði partur.

**Anna Mortensen**